

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 02 - 2013

# Føroya Tele oljusáttmála í Orknoyggjunum

Í summar fer oljumiðstøðin Flotta í Orknoyggjunum at keypa fjarskiftistænastur frá Føroya Tele, sum eigur Shefa kaðalin, ið fer upp á land í oyggjunum. Fótin fastan í oljuvinnuni Ein av føroysku vinnufyritøkunum, sum veruliga hevur megnað at fáa fótin fastan í útlendsku oljuvinnuni, er Føroya Tele. Og hetta kann fyritøkan takka sínum skilagóðu íløgum í teir báðar fjarskiftiskaðalarnar, SHEFA og CANTAT. Eftir at hava gjørt sáttmálar við nøkur av heimsins størstu oljufeløgum, eitt nú BP og Total vestan fyri Hetland og Maersk Oil og Hess í Norðsjónum, hevur tað nú eydnast Føroya Tele at lata dyrnar upp til Orknoyggjarnar. Fyritøkan hevur gjørt avtalu við oljufelagið Talisman um at veita fjarskiftistænastur til oljumiðstøðina Flotta á Orknoyggjunum. SHEFA kaðalin, sum gongur í land í oyggjunum, ger hetta samarbeiðið møguligt. Fleiri møguleikar Páll Vesturbú, stjóri í FT Net sigur við oljan.fo, at tey fara at veita radiosamband frá SHEFA støðini í Orknoyggjunum til oljumiðstøðina Flotta. Hon hevur stóran týdning fyri oljuframleiðsluna vestan fyri Hetland og tekur ímóti oljuni frá eitt nú Foinaven oljukelduni. Avtalan kemur í gildi í summar og er hon tann fyrsta, sum føroyska fyritøkan ger í Orknoyggjunum. Páll Vesturbú sigur, at møguleikar eru eisini fyri at gera aðrar avtalur í oyggjunum komandi árini. Herfyri komu Páll Vesturbú og Johan Mortensen, ið arbeiðir sum ráðgevi í oljumálum fyri Føroya Tele, aftur av kanningarferð í Orknoyggjunum.